# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Frí rúsdrekkasøla

Í blaðnum í gjár kom fram, at Johan Dahl, landsstýrismaður, hevur gjørt av, at hann ikki fer at leggja ætlaða broytingaruppskotið í rúsdrekkalógini fram um, at taka burtur avmarkingarnar fyri sterkum øli í Føroyum í dag. Gurndgevingin hjá var, at hann vil ikki seta samgonguna í váða.

Í blaðnum í dag hava vit eina spurnarkanningin millum tingfólk, sum vísir, at ein meiriluti av tingfólkunum eru fyri hesi broyting.

Samstundis hava vit eina Gallup kanning, sum vísir, at heili 62 prosent av Føroya fólki ynskja, at í øllum førum øl og vín skal kunna seljast í handlunum.

Nú kenna vit øll tilgongdina í rúsdrekkasølumálinum í Føroyum. Valla hevði annað borið til í 1992, enn ta skipan, vit fingu tá við Rúsdrekkasølu Landsins.

Men spurningurin er, um tíðin ikki er farin frá hesi skipan. Allar tær avmarkingar, sum tað almenna ásetir, kunnu varðveitast, hóast sølan fer fram í handlum kring landið. Hetta kann eisini gerast eitt kærkomið búskaparligt ískoyti hjá handlum kring landið.

Rúsdrekkasølan brúkar nógvar pengar til leigu av hølum, til umsiting og til lønarútreiðslur. Um handilin varð fluttur út í handlarnar, so kundi tað almenna spart nógvar pengar.

Ein atfinning verður sjálvandi, at betri atkomiligheit kann økja um samlaðu nýtsluna. Men landsstýrið hevur longu stungið út í kortið, at rúsdrekkasølan skal økjast, tí í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010 er roknað við hægri umsetningi og størri avlopi hjá Rúsdrekkasølu Landsins.

Tað er sjálvandi einki endamál at økja rúsdrekkanýtsluna – og tað skal ein liberalisering sjálvandi heldur ikki bera í sær. Men tað hevur týdning, at vit fáa eitt sømuligt kjak um málið – grundað á sakliga argumentatión.

**Sosialurin**

## Hevur Jørgen Niclasen misskilt okkurt..?

**RÚNI CHRISTIANSEN**
heimspekilesandi.
Vegna felagið fyri tortrúnnar føroyingar, Gudloysi



**Aftursvar til lesarabrævið 'Mannarættindadómstólurin á vandaleið'**

Eg var um at fáa kaffimunnin í rangastrúpan, tá eg fríggjadagin 6/11 í Dimmu las viðmerking uttanríkismálaráðharrans til avgerðina, mannarættindadómstólurin í Strassbourg júst hevur felt. Her bleiv noktað kristna krossinum at hanga í italskari skúlastovu. Jørgen Niclasen rør í viðmerking síni til málið uppundir, at mannarættindi eiga sín uppruna í kristindómi, og at sýtan av átrúnaðarligum ímyndum í almenna rúminum er ein vandagerð fyri framtíðar mannarættindi. Uttanríkismálaráðharrin fer longri enn so: avgerðin er enntá brot á mannarættindini. Sig mær, hevur uttanríkismálaráðharrin fullkomiliga misskilt okkurt?

At vera við, at mannarættindi spretta beinleiðis úr kristindómi, er ov lætt. Íbúgvar vesturheimsins høvdu ikki átrúnaðarligt frælsi í farnum øldum. Øll vóru »kristin«. Søgdu tey seg vera annað, mistu tey høvdið. Tað er tískil næstan komiskt at staðfesta, at einasta orsøk til at uttanríkisráðharrin kann siga, at mannarættindi spretta úr kristindómi, er tí at kristindómur ikki hevur virt mannarættindi. Ikki hevur virt átrúnaðarligt frælsi.

Tá vit í dag hyggja aftur á ræðuleikarnar, ið kristin mentan í farnum øldum hevur loyvt, mugu vit spyrja okkum sjálvi: »Hví vardi kristin mentan brot á mannarættindi fyrr, og hví fremur hon - smb. Jørgeni Niclasen - mannarættindi í dag?" Eitt møguligt svar er, at Bíblian fremur tað, sum tey kristnu vilja hava hana at fremja. Vilja tey í dag hava mannarættindi úr Bíbliuni, so fáa tey tað. Vildu valdsgraðir einaræðisharrar fyrr hava stuðlandi orð við á vegnum, áðren teir fóru út at ræna og drepa, so fingu teir tey úr somu Bíbliu. Sagt við øðrum orðum: Tað snýr seg snøgt sagt um, hvørji virðir tey kristnu leggja dent á, tá tey lesa úr Bíbliuni.

Hví so leggja dent á rættindi sum frælsi einstaklingins, talu- og skriviðfrælsi og átrúnaðarligt frælsi, tá Bíblian verður lisin? Tað finnast hóast alt nógvir aðrir mátar at lesa Bíbliuna uppá. Bíblian sigur greitt, at einans ein Guð finst. Áttu vit tá ikki at avtikið átrúnaðarligt frælsi? Tað finst bara ein Guð, punktum! Tað finst bert ein vegur og ein sannleiki smb. Bíbliuni. Hví tá ikki avtaka talu og skrivifrælsið? Um har veruligani einans finst ein sannleiki, so er ikki nógv at kjakast um. Spurningurin er, hvussu sama bók, sum umboðar ein alvaldan sannleika, og einguðalæru, kann umboða talu- og skrivi frælsi og trúarfrælsi. Fyri nógv heiðin gevur hetta onga meining.

Hvat er fyrsta niðurstøða mín? Hon er, at tað er ikki rætt, at mannarættindi spretta beinleiðis úr kristindómi. Fyri tað fyrsta vóru øll kristin í farnum øldum. Tey høvdu tíverri ikki tað átrúnaðarliga frælsið, altjóða mannarættindi tryggja okkum í dag. Fyri tað næsta eru summir av Bíbliunar grundsteinum í stríð við altjóða mannarættindi, og kunnu sostatt ikki vera upprunin til somu rættindi. Trúðarjáttanin er eitt greitt dømi um hetta. Tað finst bert ein Guð, eitt orð osfrv. Hetta er ikki sameiniligt við átrúnaðarligt frælsi, og talu- og skrivifrælsi. Í triðja lagi vísir søgan okkum, at Bíblian leggur dent á tað, vit vilja hava hana at leggja dent á. Leggja kristin dent á mannarættindi, so leggur Bíblian dent á mannarættindi. Mannarættindi finnast sostatt aftur í Bíbliuni, tí at vit vilja finna tey.

Jørgen Niclasen fýlist serligani á, at mannarættindadómstólurin í Strassbourg nú hevur felt dóm og sýtt italskum skúla at hava kristna ímynd hangandi í einari skúlastovu. Hetta metir hann vera brot á mannarættindi. Nú veit eg ikki, um Jørgen Niclasen nakrantíð hevur lisið kunngerðina um mannarættindi frá 1948, men greitt er tað, at okkurt hevur uttanríkismálaráðharrin misskilt. Kunngerðin um mannarættindi verjir m. a trúarfrælsi hins einstaka. Einstaklingurin hevur rætt til at trúgva – ella vera tortrúgvin – sum honum lystir. Taka vit hetta fyri fult, má ein beinleiðis avleiðing av hesum vera, at tjóðarátrúnaður ikki er í samsvar við mannarættindi. At trýsta ein átrúnað niður yvir høvdið á øllum borgarum, er ikki átrúnaðarligt frælsi. Tí tá hevur borgarin ikki møguleika at velja átrúnað frá. Frælsi at velja átrúnað frá er mannarættindi. Virða vit í Føroyum hesi rættindi til fulnar, tá er avleiðingin, at allur átrúnaður má út úr almenna rúminum, og lærugreinin kristni broytast til eina átrúnaðarlærugrein, ið ikki einans leggur dent á ein átrúnað, men mangar ymiskar átrúnaðir. Hetta er einasti máti at verja frælsi frá átrúnaði. Og hví ikki gera tað? Missir tann trúgvandi rættin til átrúnað av at missa rættin til at siga øðrum, hvat tey skulu trúgva? Tað er ein løgin átrúnaður, ið bæði er upphavið til trúarfrælsi og vil avgera, hvat fólk skulu trúgva. Livst so spyrst.

**ES:**
Viðvíkjandi krossinum er truplari at siga. Krossurin er í Føroyum bæði átrúnaðarligt og mentanarligt tekin.

Guðloysi: Gudloysi er einasti bólkur í Føroyum, ið treytaleyst er fyri øllum persónligum átrúnaði.

Vitja okkum á www.gudloysi.org.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.